## GÍ funnið málmann

GÍ hevði í fjør óvanligar trupulleikar við at manna plássi sum málmaður á besta liðnum. Fleiri málmenn royndu seg, men skaðar og annar skaptu óstabilitet á plássinum. Í vetur hevur GÍ leitað eftir nýggjum málmanni, og hann hava teir nú funnið. Ungarski Geza Turi hevur royndarvant í felagnum seinastu tíðina, og nú hevur GÍ gjørt avtalu við hann fyri næsta árið. Turi er farin eitt legg til Ungarn, men avtalan millum partarnar verður undirskrivað, tá ið Turi kemur aftur til landið í morgin, skrivar heimsíðan hjá GÍ.

## Súni og Jón Rói í sjónvarpið

Viasat hevur gjørt av, at tveir av komandi dystunum hjá superliga-felagnum AaB skulu sendast beinleiðis í sjónvarpi. Fyrri dysturin er ímillum AaB og FC Nordsjælland tann 2. apríl, og seinni dysturin er ímóti Brøndby tann 9. apríl. Báðir dystirnir verða vístir á TV3+, og hendan rás sæst í Føroyum.

## Noreg sum ein bananrepublikk

Fráfarandi ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn er ein maður, sum kann siga tingini júst soleiðis, sum hann heldur verða greiðast. Niels-Christian Holmstrøm hevur mangan verið frammi við provokerandi og nærgangandi viðmerkingum, og nú stendur norska løgreglan fyri skotum. Niels-Christian skal í juli mánaði møta í rættinum í Bergen, tí hann er ákærdur fyri at harðskap og herverk ímóti einum myndamanni, sum vildi taka mynd av honum eftir ein fund í Bergen. Men Holmstrøm er ikki so at syfta.

– Eg havi kært málið til norska statsadvokatin, tí framferðin hjá løgregluni líkist nøkrum, sum kann henda í eini banarepublikk, sigur Holmstrøm.

# Føroyar detta aftur á FIFA-lista

**Føroyar fara trý pláss aftur á nýggjasta styrkislistanum hjá FIFA, og europeiskar smátjóðir sum Andorra, Malta og Liktinstein liggja frammanfyri Føroyar á styrkislistanum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað vóru dagar, tá ið Føroyar kundu kalla seg sterkasta smátjóðin í Europa, men soleiðis er ikki longur.

Úrslitini hjá fótbóltslandsliðnum hava ikki verið so góð, sum tey onkuntíð hava verið, og seinastu árini eru Føroya støðugt gingnar aftur á FIFA-styrkislistanum.

Á nýggjasta listanum, sum varð kunngjørdur í dag, eru Føroyar nummar 135 av teimum 205 fótbóltstjóðunum í heiminum, og tað eru trý pláss verri enn í síðsta mánaði.

Nú eru aðrar pinkutjóðir í Europa frammanfyri okkum at FIFA-listanum. Malta er nummar 122, Liktinstein nummar 124, Andorra nummar 127, og Kasakhstan, sum hevur ligið aftanfyri Føroyar, er nú farið fram um.

Føroyar kunnu tó framvegis líta niður eftir listanum og finna fótbóltstjóðir sum San Marino og Luksemborg aftanfyri okkum.

### Týskland eftir hæli

Sterkasta fótbóltstjóð í heiminum er sambært FIFA-styrkislistanum Brasil, og Kekkia er nummar 2. Hini londini í topp 10 eru: Holland, Argentina, USA, Spania, Meksiko, Frakland, England og Portugal.

Fremsta norðurlandið er Danmark, sum liggur nummar 10. Svøríki er nummar 16.



*Føroyar detta framvegis á FIFA-styrkislistanum og ganga í mars mánaði trý pláss aftur*

Vertstjóðin til HM-endaspælið í summar, Týskland, stendur seg ikki serliga væl á FIFA-styrkislistanum. Úrslitini hjá Týsklandi hava ikki verið tey bestu, og nú er landið nummar 22 – aftanfyri lond sum Iran, Japan, Egyptaland og Nigeria.

Grannar okkara Ísland fara eitt pláss aftur á nýggjasta listanum og liggja nú sum nummar 97.

Veikasta fótbóltstjóðin í heiminum er sambært FIFA Amerikanska Samoa.

# Endaliga skráin løgd fyri Formuladeildina

**Nú hevur kappingarnevndin hjá FSF gjørt av, hvussu dystirnir í besta mandsdeildini í fótbólti skulu spælast í 2006**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Kappingarnevndin hjá FSF hevði gjørt eitt uppskot um, hvussu leikdagar og dystir skuldu verða í 2006, og hetta hava feløgini havt møguleika at gera viðmerkingar til.

Nú hevur FSF gjøgnumgingið skránna og viðmerkingarnar frá feløgunum, og endaliga skráin fyri Formuladeildina 2006 er løgd.

Í fyrsta umfari tann 2. apríl verða dystirnir hesir: EB/Streymur-B68, GÍ-Sumba/VB, NSÍ-KÍ, HB-ÍF og Skála-B36.

Spælt verður frá 2. apríl og til 16. juli, tá ið ein stuttur summarsteðgur verður. Formuladeildin byrjar aftur tann 5. august og heldur síðani fram til 21. oktober, tái ið dystirnir eru hesir: HB-ÍF, EB/Streymur-KÍ, NSÍ-B68, Skála-VB/Sumba og GÍ-B36.

Skráin fyri dystirnar í Formuladeildini kann síggjast í fullum líki á heimasíðuni hjá FSF – www.football.fo

# Arnold skiftir til ÍF

**Arnold Joensen og ÍF hava gjørt avtalu um, at klaksvíkingurin í ár skal spæla fyri fuglfirðingar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Arnold Joensen skal í ár at spæla fyri ÍF. Partarnir gjørdu í gjárkvøldið avtalu um samstarv, eftir at KÍ og Arnold strikaðu seinasta árið av sáttmálanum teirra millum*

Um vikuskiftið kom tað fram, at Arnold Joensen og KÍ høvdu strikað seinasta árið av sáttmálanum millum partarnar. Arnold vildi ikki ganga undir tær treytirnar, sum vóru galdandi á besta KÍ-liðnum, og tí gjørdu partarnir í semju av at steðga samstarvinum teirra millum.

Fleiri feløg vóru áhugað í at fáa Arnold at spæla fyri seg, og í gjárkvøldið fall avgerðin um, at Arnold Joensen spældir við ÍF hetta kappingarárið.

Arnold hevur spælt í bestu fótbóltsdeildini síðani 1991, tá hann var 16 ára gamal, og hann hevur fyri tað mesta spælt í KÍ. Eitt skifti var hann tó á Toftum og spældi.

Nú skal álopssinnaði miðvallarspælarin royna seg í reyðu troyggjuni hjá ÍF, og har verður hann liðfelagi við teir aðrar klaksvíkingar, sum eru farnir til Fuglafirðar at spæla í ár. Teir eru málmaðurin Karstin Joensen og útispælarin Julian Samuelsen.

## Nú byrjar fótbóltskappingin

**Leygardagin verða teir fyrstu dystirnir í steypakappingini hjá monnum spældir. Fýra dystir standa á skránni, og tað eru lið í lægru deildunum, sum skulu spæla**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Leygardagin byrjar kappingin um Løgmanssteypið. Í innleiðandi umfarinum spældi feløg í lægri deildunum, og Formula-liðini koma ikki upp í kappingina fyrr enn næsta vikuskiftið.

Fýra dystir verða spældir leygardagin. Á Tvøroyri verður lokaluppgerð millum TB og Royn, og niðurflytararnir á Tvøroyri skulu við nýggjum venjara við róðrið royna at fóta sær aftur í einum nýggjum kappingarári.

Ein onnur lokaluppgerð verður í Vágum, har SÍ, sum spælir í 1. deild, og MB, sum spælir í 2. deild, fara at dystast. Tvey av sterkaru lið-unum í 1. deild hittast leygardagin. Tað eru FS Vágar 2004 og AB, sum spæla í Sandavági.